# BØNARLØTAN

MARS 2023 38. árg.

## *1. Mikudagur* *1. Mós. 28. 1-22*



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**

Um Gud vil, byrja summarlegurnar 29. juni og vara í 4 vikur. Vit vóna at fara yvir aftur stutt eftir páskir. Vegna skerdan førleika er tað eitt stórt ynski og bønarevni, at onkur kann koma yvir saman við Páll at vera eitt slag av *lagsbróður* at gera ymiskt fyrireikingararbeiði.
Nærri upplýsingar á fart. 215181.

**KRINGVARPIÐ**
19. mars sjónvarpmøti, Filadelfia, Gøta
19. og 26. mars sjónvarpsandakt, Árni Joensen

**EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á www.evr.fo)**
Sunnukvøld kl. 21.00: Kelduvaðið (endursent hóskvøld kl. 21)
Týskvøld kl. 21.00: Á torginum (endursent sunnudag kl. 12.30)

***2. Hósdagur*** ***Sálm. 70 og 71***

**FØROYAR**
**Vanja og Svein í Prestgarði,**
**Svend 14, Terji 10, Petra 9**



2-6. mars eri eg partur av árliga gospeltúrinum við Norrönu, og eg verði á gospeltiltaki í Bergen 24-26. mars. Á seinni noregstúrum verður boðskapurin eisini sendur út gjøgnum sjónvarp og útvarp. Eg luttaki í andaktum á sjúkrahúsum og sambýlum, og grønlandsferð verður møguliga eisini á skránni. Biðið fyri okkum og børnum okkara.

**– Birgit og Svenning av Lofti**
**– Atlantic Mission, Juvel II**
**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**

***3. Fríggjadagur*** ***2. Tess. 2. 1-17***

**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 11, Noah Kristian 9**

Biðið, at tænasta okkara í Japan millum trúboðarar skal vaksa. Eg eri í Japan 26. feb. - 5. mars, har eg undirvísi á árligu JEMA (Japan Evangelical Missionary Association) trúboðarastevnuni. Eisini hitti eg leiðarar úr ymiskum trúboðarafelagsskapum, sum virka har.



**ZAREPTA**
Legurnar eru ásettar at vera frá 5. mai til 11. okt. Fyrireikingarnar eru byrjaðar.

## *4. Leygardagur* *1. Mós. 29. 1-19*

**DANMARK, Kristnastova**
**Susan og Øssur Berghamar**
Andaktir okkara á sjúklingahotellinum geva okkum høvi at hitta mong, sum viku eftir viku koma higar í ymiskum heilsuørindum. Hesar løtur eru dýrabarar, tí við sangi, orði, samtalum og forbøn kunnu vit vera við til at lætta um byrðarnar og vísa á Jesus. Takk fyri forbønir í hesum sambandi! berghamar@kristnastova.dk

**FØROYAR**
**– Dora og Niels Pauli Nónstein,**
**Sigrid 15, Andreas13, Kristina 12**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen,**
**Josva 13, Ester 12, Samuel 8**
**– Synnøve og Dánjal av Rana**

## *5. Sunnudagur* *2. Tess. 3. 1-18*

**ÍSLAND, Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

Nógv vilja steðga kristiligum arbeiði, so biðið, at arbeiðið heldur fram. Vit læra børnini og tey ungu eitt bíbliuvers hvønn dag, og vit bera teimum evangeliið skilligt og greitt.



**Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**

## *6. Mánadagur* *1. Mós. 29. 20-35*

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Victoria 16, Emma Grace 15, Jónatan 13, Markus 10, Evita 8, Joy 6**

Samkoman í Puruandiro trívist væl, meðan vit eru burturstødd. Vit fara aftur til Meksiko 1. juni. Takk fyri stuðul og tíðina heima í Danmark.

## *7. Týsdagur* *Filemon 1-25*

**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 13**




Marion var í farna mánaði í Guinea, har hon vitjaði nøkur, sum læra mál og mentan í einum ættarbólki. 8-16. mars undirvísa vit í Dakar. Fyrra skeiðið snýr seg um at eggja hvørt annað, og seinna

skeiðið um at tosa við fólk og hjálpa teimum, ið uppliva ógvusligar hendingar. Biðið, at skeiðini verða til signing.

## *8. Mikudagur* *1. Mós. 30. 1-24*

**OM, SUÐURAFRIKA, Mamelodi Aids Hope**
**Tanja og Kurt Abrahams**

Fríggjadagar koma um 40 ungfólk til Meetse-miðstøðina. Vit tosa um ymisk viðurskifti í lívinum og um, hvat Bíblian lærir. Rúsevnir eru ein stórur trupulleiki her. Biðið fyri ungdómsbólkinum, sum trúfast savnast her, at tey geva lív sítt fult og heilt til Jesus.

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Rebekka 17, Hanna 14**



**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen.**

## *9. Hósdagur* *Sálm. 72*

**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

Túrurin til Filipsoyggjar og Indonesia gekk væl. 9-16. mars eru vit í Connecticut. Eg skal tala í eini brøðrasamkomu sunnudagin, vit eru har, og á serligum møtum fyri elstar úr nøkrum samkomum. Eisini verða onnur møti umframt nevndarfundir hvørja viku og annað skrivligt arbeiði, sum má gerast.

## *10. Fríggjadagur* *Áp. 7. 41-60*

**OM, LOGOS HOPE,**
**TeenStreet**




Eik Klæmintsdóttir og Esther Dam Hansen eru við Logos Hope, sum er nú í Djibuti og fer til Sameindu Emirríkini síðst í mars. TeenStreet Farskot verður í Lívdini í Hoyvík 11. mars. Tilmeldingar til TeenStreet byrja í mars. Tilmeldingin til TIM er opnað. Møguleiki er fyri at fara á toymisferð til Moldova í summar. Biðið, at Gud talar til okkara ungdóm.

## *11. Leygardagur* *Josva 10. 28-43*

**DANMARK, Kolding**
**Jan og Anne Zachariassen**

Bíbliuverkætlanin gongur framá; vit eru komin til 7. kap. í Jóhannesevangelium. Eg havi fingið ábyrgd at finna tveir deyvar bíbliuumsetarar úr Evropa at fara til Kýpern á fund um at hjálpa og ráðgeva í sambandi við arbeiðið, vit gera.



**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**

## *12. Sunnudagur* *Áp. 8. 1-17*

**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 17, Rebekah 15, Lydia 13**

Vón okkara er, at Harrin útvegar fleiri starvsfólk til OM UK. Halda á fram at dagføra handbókina *Funding the Family Business* til nýggjar trúboðarar. Biðið fyri stimbran til Claire, ið luttekur á stevnu fyri kvinnur í døgunum 17.-21. mars á Capernwray Hall.

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**
Brúðleypið hjá Augustin og Samira gekk væl hóast avbjóðingar. Vit halda fram at vísa Jesus-filmin í bygdunum. Áhugi er millum átrúnaðarligu leiðararnar at lesa bókling um lív Ábrahams. Biðið, at bíbliuútgávuarbeiðið á saafimáli skal eydnast.

## *13. Mánadagur* — *Josva 11. 1-23*



**GRØNLAND**
**Juvel II**
**Gull-Britt og Karsten Hansen**
Biðið, at Harrin signar tænastuna við JUVEL II, og at manning verður til allan túrin í summar. Túrurin byrjar av Klaksvík 17. mai beinleiðis til Nuuk. Á hvítusunnu fara vit á legu inni í firðinum saman við samkomuni í Nuuk. Síðani byrjar túrurin at vitja bygdirnar norðanfyri. Ring 285007 ella skriva til karstenhansen1944@gmail.com, um tú hevur hug at koma við ella vita meira um ferðina.

## 14. Týsdagur — *Áp. 8. 18-40*




**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**

Í Naalersitaq verður barnalega 29. juni - 7. juli og ungdómslega 6-13. juli. Í Nuuk verður ungdómslegan *Outreach* 15-23. juli við bíbliutímum í samkomuni og nógvum tiltøkum uttandura, t.d. á fótbóltsvøllinum og í býnum.

Fólk í samkomuni, sum ikki hava feriu, kunnu hjálpa til eftir arbeiðstíð. Tey ungu, ið koma á legu ella til tiltøkini, venja seg soleiðis at koma í samkomuhølini og halda vónandi á eftir summarferiuna. Familjulegan verður 23-31. juli í Naalersitaq.

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

*Í dag fyllir Kristina Nónstein 12 ár
*Í dag fyllir Evita Tuohy 8 ár

## 15. Mikudagur — *Josva 12. 1-24*

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Noah 16, Lydia 6**

Sonur okkara Noah er við eftirskúlanum Alterna á ferð í Meksiko og Honduras at tæna, hjálpa og vitna. Andrew er farin upp í barnafrítíðararbeiðið *Hobbyklub*, sum er fyri børn

8-12 ár. Fleiri uttan samkomubakgrund koma har. Biðið, at Harrin signar verkið, og at børnini verða andaliga vakt.

**FØROYAR**
**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Maria og Jens Bech**

## *16. Hósdagur* *Sálm. 73*



**ONGLAND, Taunton**
**Dorit og Simon Marshall**
ECM-stevnan fyri trúboðarar verður nú hildin í Kroatia síðst í mánaðinum. Stevnan, sum er annaðhvørt ár, er tann fyrsta síðani 2018. Vit fara nakað frammanundan at fyrireika tiltakið saman við leiðsluni. Simon talar nakrar ferðir á stevnuni. Biðið, at dagarnir verða til signing.

*Í dag fyllir Lydia Berghamar 6 ár

## *17. Fríggjadagur* *Áp. 9. 1-22*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**
Vit eru komin væl áleiðis við STEVN. Stórur tørvur er á trúarverjutænastuni, og vit vóna at gera tveir túrar til Pakistan í ár. Biðið fyri Joy, ið er har.

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

### *18. Leygardagur* — *Josva 13. 1-14*

**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 11, Emma 6**
Eini 10 børn koma regluliga á møti og í sunnudagsskúla í La Fonte samkomuni. Biðið, at tey øll koma at kenna Jesus. Biðið eisini fyri Andreu og Heidi, sum leiða hetta arbeiðið.

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 9, Micah 9**

### *19. Sunnudagur* — *Áp. 9. 23-43*

**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**
Eg fari til Skotlands 20. mars. Biðið, at vit verða liðug at taka Markusevangeliið upp til St Andrews, áðrenn eg fari. Biðið eisini fyri týðingini til fólkið í Santo Domingo.



**DANMARK, Kristnastova**
**Sólva og Jákup Hansen**
Húsið er fult hvønn sunnumorgun, og nógv børn koma í sunnudagsskúlan. Biðið Harran varðveita tey lesandi. Vit eru í Føroyum frá 20-30. mars.

## *20. Mánadagur* *Josva 13. 15-33*



**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 5, Timon 3**

Vit koma aftur til Kovol í apríl, og pápi kemur at vitja eitt vikuskifti. Í USA høvdu vit gott samfelag við familju, vinir og samkomur.

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 13, Nana 11, Louie 9, Rio 3**

## *21. Týsdagur* *Áp. 10. 1-23*

**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**

Biðið fyri teimum, ið eru rakt av jarðskjálvtanum í Turkalandi og Sýria. Mong hava mist nógv, tørvur er á skjóli, mati og vatni, og nógvum tørvar sálarliga hjálp fyri skelk. Biðið fyri hjálparfólkunum. Vit fara ein túr eystureftir í mars, helst saman við øðrum. Ramadan, føstan hjá muslimum, er 22. mars til 20. apríl. Biðið, at Harrin opinberar seg fyri teimum, sum fasta og eru søkjandi andaliga.



**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 12, Leah 9, Abigail 4**

**Elam Ministries, Evropa**
**Margretha Højgaard Poulsen**
Eftir ringa jarðskjávtan 6. feb. hava iransk/afghansk kristin tikið lut í hjálparарbeiðnum í Turkalandi. Fleiri samkomur eru í økinum.

*Í dag fyllir Trisha Guttesen 11 ár

## *22. Mikudagur* — *Josva 14. 1-15*



**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**
22-23. mars skal eg leiða nevndarfundir fyri flogdeildina hjá NTM (www.ethnos360aviation.org) í Arizona. 24. mars flúgvi eg til Papua Nýgunea. 26-31. verði eg á leiðslufundum. Mær tørvar Harrans leiðslu, vísdóm og styrki.

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 11**

## *23. Hósdagur* — *Jóh. 12. 1-24*

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**



Ein muslimskur imamur longur eysturi í Filipsoyggjum hevur dúgliga lurtað eftir Orðinum. Biðið, at Harrin hjálpir honum veruliga at skilja tað, hann hoyrir, og at Harrin

støðugt verjir hann og familjuna, tí tey búgva út móti havinum, og økið verður ofta rakt av ódnum.

## *24. Fríggjadagur* *Jóh. 12. 25-50*

### PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)
### Carol og Poul Joensen



Árliga missiónsstevnan *Reach* er 24-26. mars, og vit vænta um 200 ung fólk frá ymiskum londum í Evropa. Eitt toymi kemur eisini úr Føroyum. Í løtuni undirvísi eg um bíbliuumseting á skúlanum hjá NTM.

### NTM - FØROYAR
### Noomi og Eli Christiansen
### Hadassa 12, Tabita 9, Debora 7, Natan 4

Eydna og Dávur Johannesen leiða eitt toymi úr Føroyum við 25 ungum til ráðstevnuna Reach 24-26. mars í Onglandi. Biðið um trygga ferðing, og at stevnan verður til signing.

## *25. Leygardagur* *Jóh. 13. 1-20*

### SENEGAL, Tongia
### Lív Poulsen



Eg kom aftur til Senegal 25. feb., eftir at húsini í Porkeri vórðu umvæld. Vit hava nú bíbliutímar 5 ferðir um vikuna. Ungi trúgvandi maðurin giftist nú í mars. Biðið, at tey trúgvandi búnast andaliga. Vit fyrireika, at 1. Mós. verður kannað av umsetingarráðgevanum fyrst í mai.

## *26. Sunnudagur* *Jóh. 13. 21-38*

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 2, Selah Rose 0**
Vit eru nú 4 í húskinum, og nú skulu føðibræv og pass útvegast, tí barnið er føtt uttanlands. Biðið fyri okkum, eisini at vit mennast málsliga.

## *27. Mánadagur* *Jóh. 19. 1-18*

**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 6, Jude 4, Evelyn 2**
Lili byrjar at læra Tok Pisin, tjóðarmálið á PNG. Brian tosar málið frá barnsbeini. Biðið, at børn okkara læra um kærleika Guds og fyri arbeiði okkara við máli og mentan.

## *28. Týsdagur* *Jóh. 19. 19-42*

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**
Biðið, at vit í verkinum eru ein góður angi, sum gevur føroyingum á Fyn hug til at savnast saman við okkum.

**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 14, Noah 13, Karis 9,**
**Judah 7, Ethan 5**



*Í dag fyllir Lydia Niclasen 13 ár

## *29. Mikudagur* *Es. 53. 1-12*

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**
Trúboðarastevnan *Declare His Glory* var sera góð. Tað er uppbyggjandi at hoyra um Harrans verk úti á markini.

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

## *30. Hósdagur* *Jóh. 20. 1-18*

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**
Biðið fyri okkum í Glostrup Frikirke, at samkoman mennist, og at vit eru trúgv í tænastuni.


Útgevari KBS (Kristniboðssambandið)
Blaðnevnd Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
Avgreiðsla Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057
Uppseting Grafikmaster, tel. 502022
Myndasavn info@grafikmaster.fo
Prent Føroyaprent, tel. 314555
Teldupostur prayerservicefo@gmail.com
Heimasíða www.kbs.fo

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705



©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## *31. Fríggjadagur* *Jóh. 20. 19-31*

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!

## BARNABÓK!

**32 síður 130 kr.**




Fyri langari, langari tíð síðani var tað ein týdningarmikil maður, sum arbeiddi fyri kongin. Hann var keddur og sera, sera bangin. Sonur hansara var sjúkur – so sjúkur, at hann fór at doyggja, og eingin dugdi at hjálpa honum. Men so hoyrdi hann um Jesus.

Kom við á eina ferð at finna út av júst hvat, ið hendi klokkan eitt. Søgan fer at gera tykkum bæði spent og bilsin!

FORLAGIÐ LEIRKERIÐ

Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo